tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Tjóðveldið sett upp á pláss

Oddagrein

SO hendi tað aftur. Tjóðveldisflokkurin rumblar eitt sindur móti fólkaflokspolitikkinum, ið hendan samgongan førir, men kúvendir so, tí fullveldismálið verður sett upp ímóti øllum øðrum. Fólkaflokkurin veit sjálvsagt, hvussu landið liggur og kann tí týggja sær sum hann vil í samgonguni. At Fólkaflokkurin hevur vunnið ein politiskan sigur yvir Tjóðveldisflokkin, sæst á tí, sum ein fólkaflokstingmaður segði í Krosskast í hesi vikuni um at lata eitt partafelag standa fyri Vágatunnilinum: “Tað er nakað ideologiskt í hesum”.

GLOYMD er framferð landsstýrisins móti undanfarna Landsverkfrøðingi, og Tjóðveldisflokkurin — størsti samgonguflokkur - er saman við samgonguni og Sambandsflokkinum við til at blástempla framferðina hjá Finnboga Arge móti Landsverkfrøðinginum.

ØLL ætlanin er ikki sørt ivasom. Partafelagið Vágatunnilin kann í prinsippinum seta prísin at sleppa um Vestmannasund sum tað vil. Hettar segði Finnbogi Arge í omanfyrinevdu sjónvarpssending. Hettar merkir við øðrum orðum, at vágafólk og onnur, ið koma at nýta undirsjóvartunnilin í prinsippinum onga vissu hava fyri, at tey sleppa tvørturum fyri sama prís, sum í dag, ella minni. Hettar er fyrsta stig til brúkarabetaling av tí, ið átti at verið almennar tænastur í Føroyum. Hvat verður tað næsta?

VIT hava fyrr nevnt tað skeiva í, at ein partur av føroyska veganetinum kann gerast ogn hjá útlendskum kreditorum, og at eitt alment partafelag ikki er undir lógini um alment innlit. Spurningurin er um Heini O Heinesen ikki eisini hevur rætt, tá hann sigur, at alt landsveganetið í Føroyum átti at havt sama eigara. Harmiligt er bert, at Tjóðveldisflokkurin gevir seg í hesum ideologiska máli. Hvussu verður næstu ferð ein tunnil skal borast í Føroyum? Nógvir tunlar eru einsporaðir, og gerast heldur ikki yngri. Skulu onnur partafeløg standa fyri tí? Er brúkaragjald vegurin frameftir? Hvussu verður tá við útjaðarinum?

TAÐ mest ótrúliga í argumentatiónini hjá Finnboga Arge er, at hann sigur, at partafelagsformurin er neyðugur fyri at sleppa uttanum íløguloftið á fíggjarlógini. Hví hava vit eitt íløguloft á fíggjarlógini? Tað má vera fyri ikki at ovurupphita búskapin. Heldur landsstýrismaðurin í Vinnumálum, at landið, við at lánifíggja eina íløgu uttanum fíggjarlógina, sleppur undan ovurupphiting? Bert tað, at landsíløgur vera lánifíggjaðar fyri fyrstu ferð í nógv ár, átti at fingið onkran at øtast. Lánifíggjaða íløgan hjá landstýrismanninum hevur nógv størri ávirkan á búskapin enn t.d. ein íløga, har landið innflytir tól til eitt nú Landssjúkrahúsið.

VIT eftirlýsa enn einaferð góð argument móti, at hesin tunnilin verður gjørdur av Landsverkfrøðinginum, eins og flestu undanfarnu tunlar í Føroyum. Fíggingin kann vera beint av fíggjarlógini ella fíggjað úr einum grunni uttanfyri fíggjarlógina, har peningurin verður játtaður av fíggjarlógini, uttan at hann noyðist at brúkast upp fyri hvørt ár. Vil man Landsverkfrøðingsstovninum og føroyskari tunnilsgerð til lívs, so er ivaleyst bert at taka undir við anleggslógini hjá Finnboga Arge.

Sosialurin

Viðmerking:

Er støðufesti Sambandsfloksins tað sama sum at fara í baklás?

Hvat man formaður Javnaðarfloksins í grundini meina við, tá ið hann í eini blaðgrein nú um dagarnar segði, at Sambandsflokkurin fór í baklás tann dagin, hann varð stovnaður? Tað er rætt, at flokkurin frá fyrsta degi hevur havt sum aðalmál í ríkisfelagsskapi við Danmark at menna føroyska fólkið og samfelagið á øllum økjum, og hann ætlar ikki at vika við tað. Eingin ivi kann vera um, at Jóannes Eidesgaard roynir at gera støðufesti Sambandsfloksins til nakað ódámligt fyri at leiða tankarnar hjá fólki burtur frá tí støðuloysinum og politiska skinklinum, sum nú valdar í Javnaðarflokkinum.

Fyrr í tíðini hevði Javnaðarflokkurin eina greiða politiska stevnu, sum bygdi á tær sosialistisku hugsjónirnar, tó nakað lagaðar til føroysk viðurskifti. Harav navnið, ið fedrarnir góvu flokkinum. Tað var einki ringt í tí, tvørturímóti. Eisini her í Føroyum hava vit javnaðarrørsluni nógv at takka fyri. Á tí sosiala økinum hevur flokkurin gingið á odda fyri at veita teimum minni mentu ábøtur á allan hátt. Í hesum strevi hevur flokkurin frá byrjanini av fingið hollasta stuðulin frá Sambandsflokkinum, sum hóast liberalur, er ein sosialt sinnaður flokkur.

Føroyski Javnaðarflokkurin er eins og allir teir sosialdemokratisku flokkarnir í Vesturheiminum seinastu tíðina komnir rætliliga upp í rasshaft, tí tann verkamannastættin, sum teir skuldu hjálpa, og sum veitti teimum flestu atkvøðurnar, nú er vorðin til eina miðalstætt, sum nú er farin at atkvøða borgarligt. Tí er tað seinastu árini vorðið meira og meira vanligt, at teir sosialdemokratisku flokkarnir hava otað seg til høgru og meira og meira hava rikið borgarligan politikk. Ja, nógvir borgarligir flokkar hava sæð seg vera yvirhálaðar frá høgru av sosialdemokratunum.

Hetta sama hava vit sæð her á landi seinastu árini. Samleikakreppan ger seg í ólukkumát galdandi í Javnaðarflokkinum, og tað mugu teir gera nakað við. Seinastu tvey árini hevur Javnaðarflokkurin kortini verið heppin. Tí hann situr í andstøðu til eina landsstýrissamgongu, sum ongan búskapar-, mentanar-, sosialella vinnupolitikk hevur rikið, og sum heldur ongan annan politikk ætlar sær at reka hetta skeiðið enn at útvega Føroyum fullveldi. Evsta vald!

Her sær Javnaðarflokkurin sína bjarging. Hann vil sleppa upp í dansin. Men ólukkutíð. Oddamenninir hava gloymt grasrøturnar. Flestu javnaðarfólk eins og sambandsfólk hava gaman í altíð verið tjóðskaparsinnað, men tey eru ikki loysingarhugað. Tey vilja fegin, at vit skulu gerast so sjálvbjargin sum gjørligt og vinna fram til at stýra okkara egnu viðurskiftum sum mest, men vit skulu varðveita tey bondini og tað skilagóða og frísinnaða samstarvið vit hava havt við Danmark. Heldur ikki javnaðarfólk vilja hava fullveldisdans. Tey vilja hava, at flokkurin rekur samfelagspolitikk, at politikkararnir hava fremst í huganum vælferðina hjá tí einstaka borgaranum og ikki einans hjálpa Hoydal at gera persónliga dreym sín til veruleika.

Javnaðarflokkurin veit, at hann hevur mist nógv av sínum trúvirði millum veljararnar orsakað av tí tvískinningspolitikki, hann hevur fort við at eta kirsuber við Høgna Hoydal. Í besta føri fær hann steinarnar aftur í knokkin. Javnaðarflokkurin hevur í sjálv-stýrismálum skift støðu so ofta, at onkur hevur samanborið hann við ein væl smurdan veðurhana. Uttanveltaðu tjóðveldisserfrøðingarnir úti um í samfelagnum eru altráir eftir at fáa Javnaðarflokkin við í eina breiða semju um fullveldismálið.

Upprunaliga konseptið hjá samgonguni er álvarsliga krakelerað. Vit hava sæð, hvussu Høgni Hoydal hevur annekterað øll argumentini frá teimum, ið hava øðrvísi hugsan, og sum hann ikki hevur kunnað aftur-urvíst. Í staðin fyri at vísa teimum aftur , hevur hann tikið tey upp sum síni egnu fyri soleiðis at teppa alla andstøðu í føðingini. (Tann seinasta søgan, sum gongur er, at hann vil gera Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins til einkis við at umdoypa Fullveldi til Nýveldi; men hetta man bara vera skemt. Tendensurin er ið hvussu er greiður).

Kaffifundirnir og seinasta útmeldingin frá løgmanni benda á, at tað verður ein útvatnað avtala, teir fara at koma aftur við, tí Føroya fólk skal góðkenna hana, og teir vita, at í upprunaliga líkinum hevur hon ikki ein kjans. Tá ið teir koma aftur fara teir at feira avtaluna við champanju, og Javnaðarflokkurin verður boðin við, tí hann var so positivur og hjálpti til við loysingini.

Jóannes Eidesgaard livir

í teirri trúgv, at hann og Javnaðarflokkurin geva fullveldisætlanini mótspæl. Tað ger hann ikki. Tí teir taka ikki ímóti mótspæli. Tann politiskt trillrundi løgmaðurin fær javnaðarformannin at tuska runt í maneguni við at siga, at hann dyrgir eftir eini breiðari semju. Nú má tað skjótt fara at ganga upp fyri Eidesgaard, at ein breið semja fæst einans uttan um Tjóðveldisflokkin, um Javnaðarflokkurin meinar nakað við, at loysnin skal vera innan fyri ríkisfelagsskapin.

Um nakað er í tí, som Eidesgaard sigur, at eingin flokkur hevur lagt so nógv brenni til loysingarbálið sum Sambandsflokkurin, so kundi tað hent, at hann um stutta tíð varð yvirhálaður av Føroya Javnaðarflokki, um hann ikki skjótt heldur uppat at spæla sirkushestur. Uppskot Javnaðarfloksins til Sjálvstýrislóg og Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins er einasta veruliga grundarlagið fyri eini breiðari semju, og tað kann tryggja tí einstaka húskinum vælferðina í víðastu merking, og tað eigur at vera høvuðsmálið í føroyskum politikki.

Eilif Samuelsen

Á pallin í kvøld

Í kvøld fara Eivør Pállsdóttir við manning og Shalder Geo at spæla á Café Natúr

DAGFINN OLSEN

Sum partur av størri tónleikaferð í Føroyum, Danmark, Finnlandi, Estlandi og Sámalandi, fara Shalder Geo og Eivør Pállsdóttir Kvartett í kvøld á pall.

Byrjanin til ferðina, sum er frá januar til juni í ár, verður í kvøld á Café Natúr.

Við í Shalder Geo eru Kristian Blak, Heðin Z. Davidsen, Mikael Blak og Høgni Klakkstein.

Saman við Eivør leika Búi Dam, Mikael Blak og Brandur Jacobsen.

Eivør Pállsdóttir

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við gávum, blómum, sangi, fjarritum og á annan hátt vóru við til at gera silvurbrúdleypsdag okkara hin 28. des. 1999, ógloymandi.

Heilsan
Berghild og Erolf

íslendski fiskimálaráðharrin á vitjan

Í gjár kom nýggi íslendski fiskimálaráðharrin, Árni M. Mathiesen, til Føroya til fiskivinnusamráðingar

JOHN JOHANNESSEN

Í gjár byrjaðu fiskiveiðisamráðingarnar fyri ár 2000 millum Ísland og Føroyar á Hotel Hafnia í Havn.

Hetta er fyrstu ferð, at Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, skal samráðast við nýggja íslendska fiskimálaráðharran, Árna M. Mathiesen. Áður hava samráðingarnar verið við fyrrverandi fiskimálaráðharran, Þhórsetin Pállson.

Jørgen Niclasen sigur, at samstarvið var ógvuliga gott við Þhórstein Pállson, og vónar hann, at sama fer at verða galdandi við samstarvinum við Árna M. Mathiesen.

– Fyri samráðingarnar í ár er einki serligt á skránni. Vit skulu bara syrgja fyri at halda fast upp á tey rættindi vit hava, sigur Jørgen Niclasen og vísir á, at hetta væntandi fer at bera til. Sum hann hevur skilt, er nýggi íslendski fiskimálaráðharrin eins stórur føroyavinur, sum aðrir íslendingar.

Fiskimálaráðharri Íslands, Árni M. Mathiesen, er útbúgvin djóralækni og serfrøðingur í fiskasjúkum

Skulu víðka um útnorðursamstarvið

Høgni Hoydal heldur tað kann verða Føroyum at stórum gagni, arbeiða vit fyri at víðka um útnorðursamstarvið suðureftir og vestureftir

JOHN JOHANNESSEN

– Vit mugu blása lív í norðurlendska samstarvið áðrenn tað brotnar av um tvøran.

Hetta var høvuðsboðskapurin í fyrilestrinum við Høgna Hoydal, ið Norrønafelagið í Føroyum skipaði fyri í Losjuni í Havn í gjár.

Høgni Hoydal vísti í fyrilestrinum á týdningin, norðurlendskt samstarv hevur fyri Føroyar. Serliga heldur hann, at tað kann fáa týdning fyri okkum, fáa vit grannalondini fyri sunnan, Nova Scotia og Kanada við í samstarvið.

Áhugin fallandi

Høgni Hoydal vísti á, at áhugin fyri útnorðri tykist vera alsamt fallandi innan norðurlendskt samstarv. Orsøkina til hetta heldur hann vera, at í samstarvinum er mark komið upp ímillum útnorður og skandinavisku londini somuleiðis, sum mark eisini hevur stungið seg upp millum útnorðurlondini saman við Noreg og tey skandinavisku londini, ið eru limir í ES.

– Samstundis, sum áhugin fyri londunum í útnorði er fallandi innan norðurlendskt samstarv, er áhugin fyri Baltalondunum alsamt vaksandi. Hetta haldi eg vera skeivt.

Høgni Hoydal vísti á, at hetta minnir ikki sørt um imperialismu. Tí tað tykist, sum Norðurlond royna, sum tann stóri lærumeistarin, at læra Baltisku londini um fólkaræði.

Tó segði Høgni Hoydal seg ikki vera ímóti áhuganum fyri Baltalondunum, men helt hann, at hugsað eigur at verða um, hvussu hetta samstarv er skipað.

Men fyri at styrkja um leiklutin hjá londum í útnorði í norðurlendskum samstarvi, heldur Høgni Hoydal, at vit eiga at arbeiða fyri at fáa Kanada, Nova Scotia, Hetland og Skotland við upp í samstarvið. Fáa vit hetta, er hann sannførdur um, at vit hava tryggjað okkum pallin út í heim.

Eydnast tað ikki, at styrkja útnorðursamstarvið á henda hátt, sær Høgni Hoydal stóran vanda fyri, at samstarvið brotnar av um tvøran.

Viðkomandi umhvørvispolitikkur

– Umhvørvispolitikkur er

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í norðurlandamálum

nakað, ið nógv verður gjørt við innan norðurlendskt samstarv, men eg haldi tó, at tað er burturvið at tosa um ein havumhvørvispolitikk, uttan, at londini í Norðuratlantshavi eru við.

Í hesum sambandi vísti Høgni Hoydal aftur á týdningin av at fáa Skotland, Hetland, Kanada og Nova Scotia saman við Grønlandi, Íslandi og Føroyum við upp í útnorðursamstarvið, so vit kunnu vera við til at seta dagsskránna fyri verjuna av tilfeinginum í Norðuratlantshavi.

– Tað er jú heilt náttúrligt, at londini kring Norðuratlantshav seta dagsskránna fyri verndini av Norðuratlantshavi, segði Høgni Hoydal.

NORA lykilin

Ein lykil til at styrkja um samstarvið í útnorði, er sambært Høgna Hoydal, NORA, ið er eitt samstarv millum Grønland, Ísland, Føroyar og strandalondini í Noregi. Hetta samstarvið, heldur Høgni Hoydal, kann styrkjast móti Nova Scotia, Kanada og grannunum sunnanfyri.

Hetta sigur Høgni Hoydal seg eisini hava skotið upp á fleiri fundum í ráðharrabólkinum, har hann er limur. Men hóast Ísland hevur stuðlað hesum hugskotinum, hevur móttøkan frá hinum ráðharrunum í bólkinum verið ógvuliga ymisk.

Tó er samstarvið komið so mikið langt, at tað hálvgum er gjørt av at halda eina ráðstevnu millum øll hesi londini í Føroyum einaferð í summar. Øll londini hava játtað at verið við til ráðstevnuna, har spurningurin um burðardygga veiðu verður á skránni saman við umhvørvismálum og øðrum.

Eiga eisini at geva

Høgni Hoydal heldur tað vera øsømiligt at vera við Norðurlandaráðnum, bert fyri at fáa nakað burturúr

JOHN JOHANNESSEN

– Tað er skeivt, at Føroyar eru við í Norðurlandaráðnum, bert fyri at fáa nakað burturúr. Samstundis, sum vit fáa pening frá ráðnum, eiga vit eisini at gjalda til ráðið.

Høgni Hoydal heldur tað vera keðiligt, at Føroyar ikki eru beinleiðis galdandi limir í Norðurlandaráðnum. Orsøkina sigur hann vera, at Føroyar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, og tí luttaka sum partur av Danmark, uttan sjálvstøðugan atkvøðurætt og uttan at gjalda limagjald.

Verða Føroyar sjálvstøðugir limir, merkir hetta, at vit skulu gjalda eitt limagjald, ið liggur millum 1,5 til 1,8 milliónir. Somuleiðis krevur hetta eisini, at vit eisini einaferð skulu hava formansskapin í øllum teimum mongu ráðunum innan Norðurlandaráðnum.

Høgni Hoydal sigur, at tað sjálvsagt verður torført hjá føroyingum at útfylla hesar formansskapir. Men hann vísir á, at Ísland hevur roynt hetta, og tað gekst væl. Ísland mannaði tá teir formansskapirnar, tað kundi mannað, og síðani lat tað restina av formanssessunum til Svoríki.

Nøkulunda soleiðis heldur Høgni Hoydal, at Føroyar kundu borið seg at, fingu vit sjálvstøðugan limaskap.

Heimabio

STATOIL

Nýggir filmar hvørja viku

ARLINGTON ROAD

NÅR GODTFOLK KOMMER TIL BYEN

UNIVERSAL SOLDIER

THE MATRIX

Sosialurin - 311820

Leiga videofilmar á hesum støðum:
Statoilstøðin í Gundadali tel. 314770
Statoilstøðin í Kollafirði tel. 421083
Statoilstøðin í Saltangará tel. 449133
Statoilstøðin í Klaksvík tel. 457353
Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001
Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001
Statoilstøðin í Leirvík tel. 443360

STATOIL
støðirnar kring landið